DAGSINS MEINING

Blása og hava mjøl í munninum

Tað ber ikki til at blása og samstundis at hava mjøl í munninum. Soleiðis plagar at verða tikið til, og soleiðis hevur veruleikin verið. Nú er hetta broytt. Samgongumenn hava síðani uppskotið til fíggjarlóg fyri 2004 varð almannakunngjørt ferð eftir ferð prógvað, at tað ber væl til. Tað halda teir í hvussu so er.

Tað hevði kanska verið væntandi, at tað vóru umboð fyri andstøðuna, sum kendu sín leiklut at vera kritiskir móti samgonguni. Formenninir í Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum hava eisini verið frammi og gjørt generellar viðmerkingar til fíggjarlógaruppskotið. Men tað hevur eisini verið tað einasta.

Heldur hava tað verið samgongumenn, sum hava átikið sær leiklutin hjá andstøðuni. Fíggjarlógaruppskotið hevur verið tugt og tannlað fyri afturlætnum hurðum í samgonguni, áðrenn tað brast fyri nevi.

Men tað tykist ikki hava við sær, at samgongumenn kenna ábyrgd fyri uppskotinum. Ein fyri og annar eftir hava teir verið frammi og vaskað sær sjálvum. Teir vilja fegnir sita í samgongu, og teir vilja fegnir siga, at tað gongur rætta vegin. Tá ið tað passar teimum. Opportunistiskt leypa teir fyri borð, tá ið teir halda tað tænir teimum sjálvum best í atkvøðuveiðuni. Dømini um hetta eru so mong.

Ein samgongutingmaður hevur í fleiri vikur meylað um, at samgongan hevur ein trupulleika. Hann er valdur í Norðoya valdømi, har løgmansflokkurin hevur trý umboð í løgtinginum og landsstýrinum. Um samgongulimur sigur, at samgongan hevur eitt probelm, so er hann sjálvur partur av probleminum. Nú hevur partamaður hansara í Norðoya valdømi, sum hann kappast við um tingsessin aftaná løgmann, tikið sama tráðin upp. Algoystir tosa teir báðir nú um problemini, sum samgongan hevur. Samstundis gloyma teir, at teir eru partur av samgonguni og harvið probleminum. Sovorðin opportunisma er slík undirmeting av veljaranum, sum ikki eigur at finna stað.

Í einum øðrum samgonguflokki eru teir bæði fyri og ímóti, at rækjuflotin flaggar út. Ein tingmaður, sum er reiðari á rækjuskipi, hevur verið frammi og tosað harðliga ímóti, at tað skal verða loyvt at flagga út, eftir at eitt skip hevur fingið átta milliónir í stuðli fyri at vera í føroyska flotanum. Leygardagin var ein annar tingmaður hjá sama flokki, sum eisini er uppi í rækjuvinnuni, frammi við øvugta sjónarmiðnum, sum fyrri rækjumaðurin hevði havt. Hesin seinni vildi ikki siga nei til, at hann fór at nýta sítt politiska vald, um tað kom har til, fyri at fáa rættin at flagga út.

Hetta er politiskur glæntrileikur, so tað stendur eftir í. Samgongan er á øllum økjum í stríði við seg sjálva. Høvuðssetningurin er at profilera seg og ikki, hvat tað verður arbeitt við. Hetta er ikki seriøst. Um teir eru menn fyri sessirnar, sum teir eru valdir at røkja, so eiga formaðurin í Fólkaflokkinum, sum er sjálvur løgmaður, og formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, sum er varaløgmaður, at taka í nakkan á teirra monnum og so at boða frá, hvør politikkurin hjá teirra flokkum og samgonguni er. Alt annað er óheiðurligt. Men tað snýr seg kanska ikki um heiðurligheit og miðvísan politikk. Tað snýr seg um at lefla fyri atkvøðum. Tá er tað best, um flokkarnir megna bæði at blása og hava mjøl í munninum í senn. Tí kunnu vit rokna við, at glantrileikurin fer at halda fram.Hvat sigur tann orduliga andstøðan til tað?

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fíggjarlógaruppskotið 2004 – Enn ein illa gjørd kreativ kladda

Johan Dahl
Løgtingsmaður

Við eini fyribils skjótari gjøgumgongd av fíggjarlógaruppskotinum, sær út til at hetta er enn ein illa gjøgnumført kladda.

Tað er t.d. sera sjónligt at kreativiteturin ongan enda fær tá tað um eykagjøld/skattir og inntøkurføringar er um at gera.

VAFLURNAR, SØTU KEKS og SMÁKØKUR eru nú eisini komnar á skránna fyri inntøkuskapan.

SODAVATN og annað SØTT skal eisini verða tað berandi í komandi inntøkum landskassans.

Inntøkur (Vinningsbýti) frá FØROYA TELE, sum nú politiskt skal KREVJAST ásett av nevndini er eisini ein óhoyrd mannagongd og ber brá av eini heldur ódámligari framtíð.

Spurningurin er, um tað er í trá við partafelagslógina .

EINSKILJI FØROYA TELE, FØROYA FISKAVIRKING, ATLANTIC AIRWAYS?? Tá tosað vit um nakað veruligt og ítøkiligt.

Bústaðarblokkarnir (tveir) á LS eru inntøkuførdir við 30 mio, hóast tað er sera ivasamt um hendan upphædd er møgulig at fáa fyri bygningarnar, sum sigast at verða í sera ringum standi og krevja stórar ábøtur.

Hóast hendan søla er sett á fíggjarlógina, hvussu so við LEIGUINNTØKUM av hesum bygningum , skulu tær ikki strikast av fíggjarlógini fyri 2004, ella í hvussu so er partur av teimum???

Tað at roynt verður at minakð um skuldina er alla æru vert, men er tað ikki eitt sindur hasardera at brúa 500 mio av einum landskassainnistandandi sum eftir øllum teknum í sól og mánað kemur at fáa brúk fyri 100 tals miliónum í komandi árum,- tí lítð er at ivast í at tað verður stórur eyka gjaldføristørvur komandi árini.

Lønarvøksturin orsakað av sáttmálasamráðingum er heldur ikki við í útreiðslunum á lønarsíðuni — har mangla ivaleyst eitt stað millum 60 og 80 mio krónur, so ætlaða yvirskotið tað tódnar skjótt.

Inntøkumetingarnar sýnast eisini at verða heldur bjartskygdar, og kemur tíðin at vísa um hesar ikki eru langt við síðuna av veruleikanum.

Tað verður sera áhugavert at síggja hvussu endaliga fíggjarlógin frá samgonguni kemur at síggja út, - vónandi finnað tit um ikki annað roknivillurnar og rættað tær.

Chauvinisma í Sosialinum

Ingun í Skrivarastovu og Brynhild Thomsen

Tá vit lósu greinina í Sosialinum "Funnir sekir í neyðtøku", sum blaðmaðurin Edvard Joensen hevur skrivað, fingu vit rætt og slætt vaml.

Mátin blaðmaðurin velur at viðgera evnið er undir alt lágmark. T.d. skrivar hann, at teir ungu mennirnir úr Napoli "máttu bøta hart fyri at hava samlegu við eina unga norska gentu ímóti hennara vilja". Annar teirra fekk 1 ár og 3 mánaðir. Hin 1 ára fongsul. Hvussu tað skal blíva til "at bøta hart" er ikki at skilja, tí ein valdstøka er av grovasta harðskapi, sum í mongum førum oyðileggur lívið hjá offurinum.

Síðani tekur blaðmaðurin til at sitera eina - lystiliga - mannfólkavísu um "stokkuta gleði" og kallar í hesum sambandi italienararnar fyri "unglingar". At blaðmaðurin troystar sær at skriva soleiðis um eina 15 ára gamla gentu, sum er valdstikin fýra ferðir av tveimum monnum, er heilt ófatiligt. Lesarin fær ta fatan, at blaðmaðurin smírandi hugsar um lystiligu vísuna, og at hann - sum tað vaksna og búna mannfólkið hann er - næstan tekur synd í hesum býttu unglingunum, sum ikki vistu betri!

Tað er eisini ófatiligt, at Sosialurin serverar slíkt fyri lesarunum, og vit hava hug at spyrja blaðmannin, um hann hevði hildið tað verið ein "stokkut gleði", um hann sjálvur hevði upplivað at verið valdstikin av tveimum harðligum monnum fýra ferðir?

Var skrivingin ein royndar at spæla stuttligur, so man ein søga um valdstøku vera allar seinasta stað at gera tað.

Tað, sum ger søguna uppaftur meira syrgiliga, er, at norska gentan, sum býr á einum heimi fyri ung við atferðartrupulleikum, var á vitjan í Føroyum sum liður í viðgerð fyri at koma fyri seg. Men hetta heldur Edvard Joensen ikki hava týdning fyri søguna.

Tað, sum blaðmaðurin hinvegin heldur hava týdning er, um italienararnir - umframt endurgjald til gentuna - eisini skulu rinda fyri kostnaðin av tolki og ferðaútreiðslum, sum stava frá, at "gentan við fylgi er flogin úr Noreg til Føroya við serflogfari í samband við rættarmálið". Her fáa vit sum lesarar ta fatan, at Edvard Joensen heldur, at italienararnir eru offur og ikki gentan.

Blaðmaðurin heldur, at eitt ár og tríggir mánaðir í fongsli er at bøta hart fyri eina "stokkuta gleði". Men nemur ikki við, hvussu grova valdstøkan hevur skaðað ta 15 ára gomlu gentuna, og at hendingin kanska fer at skala hennara seksualitet og sjálvsvirðing restina ay lívinum.

Tað kann ikki siga nóg ofta: Ein valdstøka er ein ólóglig, álvarslig og harðlig valdsdemonstratión, ið á ongan hátt - ongan - kann samanberast við "eina stokkuta gleði".

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Mammurnar skulu ansa børnunum, tí tað er lættast og bíligast

SJÓNARMIÐ
Annika W. Joensen

Men er tað eisini best? Tað er spurningurin.

Tá broytingaruppskotið um barsilsskipanina í desember 2002 var fyri á tingi, tóku nógvir løgtingslimir orðið. Ikki tí teir høvdu kannað, hvussu broytta lógin fór at ávirka børnini, pápar og mammurnar. Ikki tí teir høvdu sett broytingaruppskotið inn í eina heild og sóu, hvussu tað fór at ávirka arbeiðsmarknaðin, familjuna og samfelagið sum heild.

Flestallir tinglimir tóku orðið fyri at minna á, at mamman er tann besta at ansa barninum. Og at pør eiga rættin til sína millum at velja, hvør skal vera heima hjá barninum. Grundgevingin var, at hetta vóru royndirnar hjá tinglimunum sjálvum, og at tað hevði riggað væl fyri 20, 30 og 40 árum síðani.

Nøkur heilt fá vardu rættin hjá barninum at verða ansað av báðum foreldrum. Nøkur heilt fáa vardu rættin hjá kvinnuni at velja, og søgdu, at kvinnan er tann, sum betalir prísin. Hon, sum fær minni í løn, tí hon verður roknað sum óstabil arbeiðsmegi. Hon, sum ikki fær somu tilboð sum hennara mannligu starvsfelagar, tí tað er hon, sum skal eiga børnini, ansa teimum og fer heim, tá tey eru sjúk. Hon, sum missir pensiónsinntøkur, sum aldri kunnu vinnast innaftur, tí inntøkurnar verða forvunnar, meðan kvinnan enn er ung og standa og renta í so nógv ár.

Men ongin segði tað, sum flestøll hugsaðu: Arbeiðsmarknaðurin kann ikki vera monnum fyri uttan. Og at vit ikki hava ráð at lata mennirnar ansa børnunum, tí teir hava so nógv størri inntøkur enn kvinnurnar. Tað tordi ongin, hóast tað í royndum og veru hevði verið tað erligasta, nú støðan var, sum hon var.

Uppskotið var nevniliga tað, at ikki skuldi bera til at nýta 6 teir bestu mánaðirnar av 12, har inntøka varð forvunnin. Og at farloyvistíðin skuldi leingjast við einum hálvum ári, uttan løn. Uppskotið segði alt: Mammurnar skulu ansa børnunum, tí tað er tað lættasta og tað bíligasta.

Tað lættasta, tí so skal onki broytast:

Arbeiðsmarknaðurin kann koyra víðari í sama lag, og nýtist ikki at laga seg eftir broyttu umstøðunum hjá monnum og konum, sum hava tørv á einum arbeiði og ynskja familju. Arbeiðsmarknaðurin kann satsa uppá, at konurnar taka um endan heima, so maðurin kann vera til taks á arbeiðsplássinum. Páparnir nýtast ikki at læra seg at hava børnini. Sjálvir at ansa teimum og geva teimum umsorgan, uttan at mamman blandar seg uppí. Teimum nýtist bert at gjalda til Barsilsskipanina, sum mammurnar so fáa útgjald frá.

Og páparnir verða framvegis við sviðusoð, tá um foreldramynduleika ræður, tí siðvenjan er tann, at mammur fáa børnini, tá pør fara hvør til sítt. Og børnini mugu bara fylgja við.

Mammurnar nýtast ikki at geva pláss fyri pápunum heima og í staðin átaka sær størri ábyrgd á arbeiðsmarknaðinum og harvið prógva, at tað ber til og er neyðugt at sameina arbeiðs- og familjulív. Og at tað í dag er ein samfelagslongst, um bara kvinnur skulu hava úr skipanini.

Og verða kvinnurnar framvegis mest heima, fer lønarlagið í teimum yrkjum, har kvinnurnar eru flestar, framvegis at vera lægri enn hjá monnunum. Kvinnurnar verða framvegis tær fátækstu. Umsorgan, læring og aðrar uppgávur, sum kvinnur røkja, verða millum tey lágst raðfestu og tey minst prestigufyltu yrkini.

Teir dagarnir í desember 2002, tá broytingaruppskotið hjá landstýrismanninum í vinnumálum var til viðgerðar, høvdu flestu løgtingslimir yvirhøvur lítið uppá hjarta. Tað varð flent og gnisað í salinum, men tað visti fáur, tí hvørki almenningur ella fjølmiðlar vóru til staðar. Kanska var málið ikki mett at vera álvarsligt?

Minnist annars fleiri mál, har allir fjølmiðlar, allir tinglimir og landstýrisfólk, ja alt Føroya fólk hell ondini nakrar tímar. Tá var ikki flent. Tá var alt á gosi, hóast avleiðingarnar av teimum málum vóru knýttar at einstøkum persónum og vóru lítlar og ongar fyri fólkið og samfelagið sum heild. Avleiðingarnar av, at bert mammur sleppa at ansa børnunum, hava vit hoyrt lítið um, men einki er at ivast í, at hesar eru álvarsligar fyri alt fólkið og alt samfelagið.

Og tey, sum fingu hoyringsskrivið frá landsstýrismanninum í vinnumálum, nýttust kanska ikki at hava lagt so stóra orku í, tí tá av tornaði sóust teirra ráð ikki aftur í uppskotinum, hóast tey eisini hava innlit og eisini duga at meta um avleiðingarnar. Endamálið tá var at spara.

Og tað er tað framvegis í dag, nú talan hevur verið um at seta fram nýtt uppskot um at broyta lógina fyri barsilsskipanina. Hví er endamálið ikki at betra og menna?

Flestøll hava virðing fyri og skilja, at sparingar eru neyðugar. Men virðingin fánar burtur, tá tað ferð eftir ferð vísur seg, at heildarmyndin væntar og at sparingarnar verða framdar 'her og der', og ikki har, sum tær eru uppá sítt pláss.

Vanligi borgarin kann tilláta sær at hugsa um seg og síni, og lata heildarmynd vera heildarmynd. Tað er sjálvandi ikki sera heppið, men hvør kann lasta borgaran fyri tað? Løgtingslimir og landstýrisfólk hava ikki henda luksus, ella margløti. Tey skulu hugsa um heildina, um samfelagið og um landið. Tey skulu fremja neyðugar broytingar. Eisini tær broytingar, sum tey frykta fyri, at teirra egni veljaraskari kanska ikki ynskir.

Og her er tað, at løgtingslimir í desember 2002 fóru skeiv, tá teir róstu mammuna uppum skýggja og loyvdu henni at vera heima hjá barninum, uttan at gjalda fyri ansingina. Og tá teir noktaðu pápanum sama rætt og ikki hugsaðu um tørvin hjá barninum.

Eg vóni, at løgtingslimir, nú tey eftir øllum at døma fáa ein tjans afturat at broyta lógina um barsilsskipanina, fara at taka støði í heildini og hava familjuna, arbeiðsmarknaðin og samfelagið sum heild í huga. At tinglimir viðurkenna, at vit eru í 2003 og lata vera við at romantisera farnar tíðir, sum ikki kunnu brúkast sum model í dagsins samfelagi. Og so als ikki í einum samfelagi, sum vil rópa seg altjóða.

Tað ber til í Íslandi. Hví ber tað ikki til í Føroyum?

Tíðindaskriv frá Tórshavnar kommunu og Politistøðini í Tórshavn um tunga ferðslu í Havnini

TÍÐINDASKRIV
Tórshavnar kommuna og Politistøðin í Tórshavn

Í sambandi við at ov nógv tung ferðsla fer í gjøgnum í miðbýarøkið, hava vega- og ferðslumyndugleikin í Tórshavnar kommuna, samtykt at leiða tungu ferðsluna út á ringvegin, og kemur samtyktin í gildi 15. oktober 2003.

Hetta førir m.a. við sær at tunga ferðslan millum Eystara vág og Vestara vág skal eftir ringvegnum.

E68-skelti við C32-symboli, ikki loyvt vognaraði við veruligari heildarvekt meiri enn 20 tons, verða sett upp á hesar vegir:

- Jónas Broncks gøta, við rundkoyringina við Smyril Line
- Djóna í Geil gøta, við Fiskimálaráðið.
- Tórgarðsgøta, við Yviri við Strond.
- Hoyvíksvegur, yvir av Superdekk.
- R.C. Effersøes gøta, niðan fyri rundkoyringina við SMS.
- Gundadalsvegur, við Miðstovnin
- Ávargeil, við Norðara Ringveg.
- Varðagøta, við Norðara Ringveg.
- Dalavegur, við Marknagilsvegin.
- Svalbardsvegur, við Marknagilsvegin.
- Landavegur, við Marknagilsvegin.
- Heygsvegur, við Velbastaðvegin.
- Frælsið, við J. C. Svabos gøtu.
- J. C. Svabos gøta, við skrivstovuna hjá Tórshavnar skipasmiðju

At ynskja sær børn í 2003 er ein fíggjarligur spurningur

Kenneth Rasmussen
form. Unga Sjálvstýri

og hann verður størri í 2004, nú fíggjarlógin leggur enn størri byrðar á barnafamiljurnar.

Tá tað var greitt at inntøkur landskassans í komandi árið fóru at verða nakað lægri enn í ár, komu boð úr fíggjarmálaráðnum um, at nú mátti sparast. Sagnorðið "spara" merkir ikki tað sama í fíggjarmálaráðnum sum fyri vanliga borgaran. Tá vanligi føroyingurin tosar um at spara, merkir tað at minka um útreiðslurnar, men í fíggjarmálaráðnum merkir tað at økja inntøkurnar; nakað, sum vanligi føroyingurin ikki soleiðis kann gera í eini handarvend.

Tað er jú so nógv lættari at mergsúgva skattborgaran, heldur enn at spara í almennu útreiðslunum. Aftur hesaferð varð lopið uppum, har garðurin er lægstur, við m.a. at økja avgjaldið á sleikisneisar, bomm og sodavatn og rópa tað heilsuavgjald; verri mønsnið skal ein leita leingi eftir. Og so klandraðust Bill og Karsten um, hvør átti uppskotið!

At skerja mjólkastuðulin og rentustuðulin rakar so at siga bert barnafamiljurnar. Nógvar av hesum familjum hava frammanundan so ilt við at fáa endarnar at røkka saman, at tað at ynskja sær eitt barn afturat fyrst og fremst er ein fíggjarligur spurningur. Hetta eru fólkini, sum eftir at hava verið undir útbúgving í nøkur ár, fara í nýggj krevjandi størv, seta fót undir egi borð, fáa børn, standa fyri og luttaka í frítíðarvirksemi, ganga til mentanartiltøkini og ítróttartiltøkini; eru kjarnan í føroyska samfelagnum og samstundis gjalda heila gildið fyri at fíggja vælferðina.

Við ÚF segði fíggjarnevndarformaðurin í seinastu viku, at lættast var at fara eftir peningi, har peningur er til. Eg meini tað.